# SUMBIAR KOMMUNA

## STÝRISGERÐABÓK 2016

## 26/09-2016-09

| | |
|---|---|
| **Fundur nr. 09**<br>Tíð: **26. September. 2016, kl. 19:00**<br>Stað: **Kommunuskrivstovan** | Notis: |
| Fastir fundardagar:<br><br>29.01 – 26.02 – 26.03 – 11.04 – 09.05 – 17.06 – 15.08 - 26.09 – 24.10 – 07.11 – 05.12 | Møttir:<br>Eyðbjørn Thomsen<br>Brynleif Bech<br>Niclas Hentze<br>Frits Poulsen<br>Rúni Lisberg |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 09/01**<br>• **Umsókn um byggjan av altani á matr. nr. 32b.** | • Samtykt var at geva byggiloyvið til eitt vindfang og ein altan á matr. 32b. Men eigaraviðurskiftini mugu koma uppá pláss fyrst. |
| **Mál nr. 09/02**<br>• **Skriv frá forkvinnuni í musikkskúla nevndini.** | • Sumbiar kommuna er sinna at fáa loyst hettar málið. Tað hava verið nakrir fundir ímillum kommununnar, men enn er einki hent.<br>Sumbiar kommuna er vitandi um, at Tvøroyrar kommuna ger eina roynd at fáa gongd í málið nú, so bíðað verður eftir at frætta nærri frá hesari royndini. |
| **Mál nr. 09/03**<br>• **Hølir til Sernám.** | • Sumbiar kommuna vil bjóða hølir á Leiti fram til Sernám. |
| **Mál nr. 09/04**<br>• **Uppskot til fíggjarætlan fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy.**<br>• **Uppskot til fíggjarætlan fyri Barnaverndarsamstarvið.** | • Samtykt. Sumbiar kommunu vil heita á kommunufelagið um at taka afturberingina upp við fíggjarmálaráðið. Eldraøki "kostar" Sumbiar kommunu umleið 500.000,- kr. eyka hvørt ár.<br>• Samtykt. |
| **Mál nr. 09/05**<br>• **Tilboð uppá grevstur.** | • Samtykt var at taka av hesum tilboð dagfest 05.09.2016 frá BKE. |
| **Mál nr. 09/06**<br>• **Umsókn um stuðul til seyðasýningina 2016.**<br>• **Umsókn um rakstrarstuðul til Sumbiar sóknar bygdarsavn.**<br>• **Umsóknir um stuðul til nýggjárshald í sóknini.**<br>• **Umsókn um stuðul til námsferð.**<br>• **Umsókn um stuðul til føstulávintshaldið 2017.**<br>• **Stuðul til eina kunningarferð.**<br>• **Umsókn um stuðul frá Sumbiar dansifelag.** | • Samtykt var at stuðla við 7.000,- kr.<br>• Sumbiar kommuna hevur stuðla Savninum á hvørjum ári og samtykt er at stuðla við somu upphædd í 2017.<br>• Samtykt var at stuðla í Sumba og- Lopra/Akrar.<br>• Samtykt var at stuðla sum vanligt við 1.000,- kr. / næming.<br>• Samtykt var at seta pening av til føstulávintshaldið 2017. Sumba- og í Lopra/Akrar.<br>• Samtykt var at stuðla hesu ferð við 5.000,- kr.<br>• Samtykt var at stuðla.<br>• Samtykt var at gerast ein partur av hesu verkætlan, um hettar verður til |

SUMBIAR SÓKNAR KOMMUNA

| | |
|---|---|
| • **Umsókn viðv. Borðspælinum Herferð** | veruleika. |
| **Mál nr. 09/07**<br>• **2. Viðgerð av flyting ímillum bólkarnar. ( Flyta 200.000,- kr. frá viðlíkahald av Guanobúðini til Samkomuhúsið. ) 2. viðgerð ( Flyta frá húsinum á Krossinum 250.000,- kr. 100.000,- kr. frá bakkaverjuni og 100.000,- kr. frá vatnleiðingini, til asfalt arbeiðið.** | • Samtykt við 2. Viðgerð. |
| **Mál nr. 09/08**<br>• **1. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2017.** | • Útsett til komandi fund. |
| **Mál nr. 09/09**<br>• **Útleggjan av bátabrúgvunum í Lopra.** | • Vísandi til samtykt frá síðsta fundi um útleggjan av bátabrúgvunum.<br>Aftaná at hava fingið nýggja kunning um veður og vind frá lokalt kendum fólkum, hevur bygdarráðið samtykt, at broyta hesa samtykt til, at brúgvarnar koma at liggja fram við keiini eystur og vestur. |
| **Mál nr. 09/10**<br>• **Umsókn frá Arctic Waters.** | • Samtykt var at biða Arctic Waterd koma á ein fund við Sumbiar kommunu. |
| **Mál nr. 09/11**<br>• **Umsókn frá Bakkafrost.** | • Samtykt var at lata Bakkafrost Farming okkara part av avlops vatninum til avlúsan. |
| **Til kunningar.**<br>• **Hoyring skriv til kunngerð um framleiðslu av føroyskum matvørum.** | • Kunna var um hesa kunngerð |
| **Til støðutakan ella lukkaðan fund.**<br><br>• **Eitt mál til lukkaðan fund.** | |

Fundurin lokin kl. 23:00

Eyðbjørn Thomsen    Frits Poulsen    Niclas Hentze

Rúni Lisberg    Brynleif Bech